ítróttur

B36 bestu landskappingarbyrjan

Unglingar, bólkur A:

TB–ÍF 5-2 (3-1)

Í fjør áttu fuglfirðingar at spæla á Sevmýri í síðsta leikumfarinum, men tann dysturin varð ongantíð spældur. Í ár áttu teir fyrsta dystin har suðuri, og hann varð spældur longu fríggjakvøldið.

Tvørámenninir høvdu betra liðið. Teir vóru skjótir at koma í álop, og teir høvdu eina góða verju.

Kortini var tað ÍF, sum kom á odda, tá 1. hálvleikur var hálvrunnin: Andrew Hansen stútaði innlegg úr vinstru í málið.

Hálvur tími var runnin, tá Dion Petersen smekkaði í kassan, eftir at bólturin hevði stiklað eina ferð eitt vet inni í brotsteiginum.

Sum 1. hálvleikur leið kavaði alt meiri, og tað er ein spurningur, um dysturin hevði verið leiktur liðugur, um gestirnir ikki vóru komnir so langa leið. Reyður bóltur var fingin til vega, og tað hjálpti nakað. Í hvussu so er hevði Karl Øster ikki truppulleikar við at raka bóltin og skora, tá 37 minuttir vóru leiktir.

Dygst undan hvíldini økti Andre Dalfoss til 3-1, tá hann fór einsamallur eftir miðásanum.

Tá Karl Øster seks minuttir eftir hvíldina stútaði til 4-1 var alt avgjørt. Jón Tórður Holm økti eftir góða samanspæling, og Kenneth Neshamar minkaði stutt undan leikloki, tá bólturin stakk út aftur eftir skotroynd.

B36a-HBb 13-0 (5-0)

B36 tykist hava gott lið í ár. Í fjør fingu teir silvur, og blandingin millum uppfluttar leikarar og nakrar, ið vóru á liðnum í fjør, tykist borga fyri, at teir eisini í ár vera millum teirra, sum fara at stríðast um heiðursmerkini.

HB hevði fyrra partin av árinum í fjør tvey góð lið, sum eitt skifti bæði vóru í betra endanum. Seinni datt b liðið púra burtur ímillum.

Hesin dysturin gav ábendingar um, at b liðið er illa mannað, og verður tað ikki styrkt var hetta neyvan síðstu ferð, at tapið verður tvey cifrað.

Zacharias Bech fekk góða byrjan á skjúttaralistanum, og hann man saman við Høgna í Jákupsstovu fara at enda nakað ovarlaga.

Unglingar bólkur B:

FS Vágar er millum feløgini, sum er komið í B-bólkin. Men tað er um reppið, at teir hava tikið liðið úr kappingini. Ferðaætlanin um Vestmannasund er soleiðis skikkað, at tað er torført, ja so at siga ómøguligt at hava fótbóltslið, sum mitt í viku skulu ferðast um sundið. Og tað er spell, bæði fyri vágamenn og fyri mótstøðuliðini, sum nú eftir tørni noyðast at bíða órímuliga leingi eftir dystum.

B36b-HBa 2-7 (1-3)

Bara ein dystur er leiktur. A liðið hjá HB vann móti b liðnum hjá grannafelagnum, men sigurin var verri enn so eins sannførandi, sum í hinum innanhýsis dystinum.

HB restaði tveir av stuðulsleikarunum, og teir báðir, sum gjørdu mest um seg, vóru John Heri Dam og Julian Johnsson. Teir skoraðu øll sjey málini.

-nn-

Steypakappingin hjá unglingunum:

HB og NSÍ best fyri at koma í finaluna

HB megnaði javnleik úti móti EB/Streymi í fyrru semifinaluni, meðan NSÍ á heimavølli vann á KÍ

Tað hevur verið heldur tvørligt at fáa landskappingardystirnar frá hondini. Sambært skipanina skuldi fyrsta umfarið avgreiðast mikukvøldið í síðstu viku, men tá var illveður, og eingin dystur varð spældur.

Um vikuskiftið vóru fuglfirðingar á Tvøroyri, og í hesi vikuni eru nakrir dystir leiktir. M.a. fyrra umfarið í semifinaluni. Teir báðar dystirnar, sum vórðu leiktir flaggdagin, taka vit fyrst.

EB/Streymur-HB 1-1 (0-0)

Samansetta liðið hevur fingið fýra unglingar av Skála í hópin. Hetta var fyrsti dysturin, teir vóru við.

Fitt lot var í Streymnesi, og heimaliðið hevði vindin undan fyrra hálvleik. Bólturin var meiri á HB hálvuni, men tað knípti hjá heimaliðnum at spæla seg til upplagdar málmøguleikar.

Eftir hvíldina høvdu havnarmenninir undanvind, og teir megnaðu at spæla seg til fleiri møguleikar. Tvær ferðir vóru teir púra einsamallir við málverjanum, men aðru ferðina bjargaði Brian Kristiansen frálíkt og aðru ferðina fór skotið langt við síðuna av.

HB kom á odda 10 minuttir inn í 2. hálvleik. Heðin Lamhauge stútaði í kassan eftir hornaspark.

Korter restaði, tá tað varð javnað. Frísparksinnlegg úr síðuni fór tvørtur um til ein av skálamonnunum, Kajsten, sum stútaði yvir um aftur, har Allan Kristensen fekk bóltin um strikuna.

Sambært skipanina skal seinna semifinalan spælast 12. mei, sama dag sum 1. deildarliðið hjá HB skal í Sandoynna til seinnu semifinaluna um løgmannssteypið. Einki er at ivast í, at havnamenninir royna at fáa unglingadystin fluttan, tí so góðir menn sum Julian og John Heri (um hann er sloppin av við skaðan) eru sjálvskrivaðir í 1. deildarhópinum.

NSÍ-KÍ 3-1 (1-0)

Tað var eisini nakað av vindi í Runavíkini. Klaksvíkingarnir spældu undan vindinum fyrra hálvleik, men NSÍ kom á odda rættiliga skjótt. Dánial Hansen skoraði.

KÍ hevði bóltin nakað, men teir megnaðu ikki at tilspæla sær serliga stórar møguleikar. Tá Høgni Kastalag noyddist skaddur út, gjørdist fyritreytin fyri góðum úrsliti ikki betur.

Í 2. hálvleiki hevði NSÍ stóra leikliga yvirvág. Teir komu skjótt framum 2-0. Málið var vakurt: innlegg úr høgru sigldi yvir verjuni og við handara stólpan tveitti Kári Hansen seg fram og stútaði um stólpan í málið.

KÍ broytti síðani nakað. Egil Leivsgarð fór av aftasta manni og á miðvøllin. Miðskeiðis í 2. hálvleiki fór hann ígjøgnum í vinstru, legði flatt innfyri til Torleif Eyðun Petersen, sum smekkaði í netið.

So vóru klaksvíkingar næskir lítla løtu. Serliga eftir at NSÍ fekk mann útvístan fyri hevnisøku. Men stutt undan leikloki var tað NSÍ, sum økti. Óli Hansen fluktaði innlegg úr høgru inn um Gunnar á Steig.

Sigurin var uppiborin, og sum leikur fór hesa ferð, er lítið sum bendir á, at KÍ megnar at vinna tey bæði málini inn aftur á heimavølli.

-nn-

HAGTÍÐINDI

Unglingar, steypakappingin 1. semifinala:

EB/Streymur–HB 1-1 (0-0)
0-1: Heðin Lamhauge
1-1: Allan Kristensen

NSÍ–KÍ 3-1 (1-0)
1-0: Dánial Hansen
2-0: Kári Hansen
2-1: Torleif Eyðun Petersen
3-1: Óli Hansen

Seinnu semifinalurnar verða leiktar 12. mai. Finalan verður 29. juni.

Úrslit, unglingar, bólkur A:

B36a-HBb 13-0 (5-0)
1-0: Jógvan Andreassen
2-0: Zacharias Bech
3-0: Zacharias Bech
4-0: Zacharias Bech
5-0: Høgni í Jákupsstovu
6-0: Gunnar Nielsen
7-0: Hans Jákup Johannesen
8-0: sjálvmál
9-0: Tórarin Hentze
10-0: Høgni í Jákupsstovu
11-0: Zacharias Bech
12-0: Høgni í Jákupsstovu
13-0: Zacharias Bech

TB–ÍF 5-2 (3-1)
0-1: Andrew Hansen
1-1: Dion Petersen
2-1: Karl Øster
3-1: Andre Dalfoss
4-1: Karl Øster
5-1: Jón Tórður Holm
5-2: Kenneth Neshamar

B36b–HBa 2-7 (1-3)
0-1: John Heri Dam
0-2: John Heri Dam
0-3: Julian Johnsson
1-3: Finn Holm Petersen
1-4: John Heri Dam
1-5: John Heri Dam
2-5: Ken Zachariasen
2-6: Julian Johnsson
2-7: Julian Johnsson

Støðan, unglingar, bólkur A:

B36a	1	1	0	0	13- 0	2
TB	1	1	0	0	5- 2	2
ÍF	1	0	0	1	2- 5	0
HBb	1	0	0	1	0-13	0
EB/Str.	0	0	0	0	0- 0	0
NSÍ	0	0	0	0	0- 0	0

Støðan, unglingar, bólkur B:

HBa	1	1	0	0	7- 2	2
B36b	1	0	0	1	2- 7	0
B68	0	0	0	0	0- 0	0
GÍ	0	0	0	0	0- 0	0
KÍ	0	0	0	0	0- 0	0
FS Vágar	0	0	0	0	0- 0	0

Málskjúttar, unglingar:

Zacharias Bech	B36a	5
John Heri Dam	HBa	4
Høgni í Jákupsstovu	B36a	3
Julian Johnsson	HBa	3
Karl Øster	TB	2
Jógvan Andreassen	B36a	1
Tórarin Hentze	B36a	1
Hans Jákup Johannesen	B36a	1
Gunnar Nielsen	B36a	1
Finn Holm Petersen	B36b	1
Ken Zachariassen	B36b	1
Andrew Hansen	ÍF	1
Kenneth Neshamar	ÍF	1
Andre Dalfoss	TB	1
Jón Tórður Holm	TB	1
Dion Petersen	TB	1

Dreingjadeildin:

HBa-B36b 0-2 (0-0)
B36b: Bogi Øster og Høgni á Borg

KÍ-SÍF/MB 8-1 (4-1)
KÍ: Heðin á Lakjuni (3), Sámal Mikkelsen, Rógvi Jacobsen, Kristian Andreassen, Rúni Eltør, Niclas Niclassen
SÍF/MB: Petur Frank Joensen

LÍF-B36a 1-6 (0-3)
LÍF: Tummas Justinussen
B36a: Kristian Gunnleif í Garðastovu (2), Finn Mørk, Flóvin Þór Næs, Jákup Lamhauge, Annfinn Hansen

ÍF-B68 2-0 (0-0)
1-0: Bárður á Lakjuni
2-0: Áslakkur Petersen

VB-NSÍ 1-3 (1-0)
VB: Jákup Joensen
NSÍ: Dagfinn Olsen, Kári Sigvardsen, Sigurjón Einarsson

Støðan, dreingir:

KÍ	1	1	0	0	8- 1	2
B36a	1	1	0	0	6- 1	2
NSÍ	1	1	0	0	3- 1	2
B36b	1	1	0	0	2- 0	2
ÍF	1	1	0	0	2- 0	2
VB	1	0	0	1	1- 3	0
B68	1	0	0	1	0- 2	0
HB	1	0	0	1	0- 2	0
LÍF	1	0	0	1	1- 6	0
SÍF/MB	1	0	0	1	1- 8	0

Málskjúttar, dreingir:

Heðin á Lakjuni	KÍ	3
Kristian Gunnleif í Garðastovu	B36a	2
Annfinn Hansen	B36a	1
Jákup Lamhauge	B36a	1
Finn Mørk	B36a	1
Flóvin Þór Næs	B36a	1
Høgni á Borg	B36b	1
Bogi Øster	B36b	1
Bárður á Lakjuni	ÍF	1
Áslakkur Petersen	ÍF	1
Kristian Andreassen	KÍ	1
Rúni Eltør	KÍ	1
Rógvi Jacobsen	KÍ	1
Sámal Mikkelsen	KÍ	1
Niclas Niclassen	KÍ	1
Tummas Justinussen	LÍF	1
Sigurjón Einarsson	NSÍ	1
Dagfinn Olsen	NSÍ	1
Kári Sigvardsen	NSÍ	1
Petur Frank Joensen	SÍF/MB	1
Jákup Joensen	VB	1